# Viðmerking til svar: "Avgreiðslugjald ella eykaskatt"



KÁRI P. HØJGAARD
løgtingsmaður

Í bløðunum hevur Bjørn Kalsø eitt svarskriv til mína blaðgrein, um álagda gjaldið fyri fiskiloyvi og flytan av fiskidøgum. Tøkk skal landstýrismaðurin hava fyri tað. Svarið gevur tó onki gjøgnumskygni av, hvussu júst 500 krónum í avgreiðslugjaldi av fiskiloyvinum kemur fram.

Hvat skal útróðrarmaðurin í veruleikanum gjalda fyri ? Tað var høvuðsboðskapurin í lesarabrævi mínum.

**Í § 9 stk.1** stendur í lóg um vinnuligan fiskiskap, at landstýrismaðurin hevur heimild at gera:

5) Skipan við veiðu- og fiskiloyvum og avgreiðslugjald í hesum sambandi og í sambandi við avhending av fiskidøgum og kvotum.

Formelt hevur landsstýrismaðurin, sum eg eisini vísti á í greinini, loyvi til at áleggja gjøld fyri fiskiloyvi, men eg meti ikki at tað er í tráð við andan í lógini, at smærru útróðrarbátarnir skulu gjalda 500 krónur fyri at endurnýggja sítt fiskiloyvi. Er tað ikki útróðrarbátarnir og smærru fiskiførini ið gjalda bróðurpartin av áløgdu upphæddini og hvussu stórur (lítil) er parturin, ið hevur upp í 15 loyvir. Mær vitandi eru hvørki brúkarar ella politiska skipanin hoyrd, og eg eri framhaldandi av tí áskoðan, at Løgtingið ikki hevði samtykt, at útróðrarmaðurin og tey smærru fiskiførini skuldu gjalda stórt sæð alt gildið.

Skemtilig er samanberingin hjá landsstýrismanninum, tá hann til sammetingar nevnir nøkur dømi um gjøld fyri tænastur, ið eg haldi fult undirbyggja, at onki grundarlag er fyri okursgjaldinum fyri loyvinum til smábátar, citat:

*Fyri at lýsa spurningin kann til samanberingar nevnast, at skal borgari hava pass, koyrikort, nummarspjaldur á bilin ella ein seyð fluttan í aðra oyggj, verða avgreiðslugjøld kravd inn av avarandi stovni ella ráði.*

- Fyri eitt pass ið er galdandi í 10 ár verður goldið 400 krónur, sama arbeiði at útskriva barnapass, men hetta er nógv bíligari.
- Útskrivan av koyrikortið ið er laminerað kostar 550 krónur og kann í besta føri verða galdandi í 58 ár. Verður kortið endurnýggja vegna burturmiss ella tað brotnar er prísurin 250 krónur. Endurnýggja vegna aldur skal brúkarin bert gjalda fyri læknaváttan.
- Tá talan er um nummarspjøldur, er tað eisini ein langtíðaríløga, har tú fyri peningin fær útflýggjað eitt sett av nummarplátum.
- Tá talan er um seyðaflutning millum oyggjar fær tú eina tænastu. Nú talan er um gjald hjá smábátum mótvegis risaskipum, hevði eg roknað við, at ivaleyst kostar meir at fáa eina kúgv flutta um fjørðin enn ein seyð.

Til seinast fari eg at heita á landstýrismannin um at geva eina frágreiðing við greiðari uppseting av roknistykkinum, hvussu lutfallið millum arbeiðsorku og útreiðslurnar hjá Fiskimálastýrinum av at útskriva fiskiloyvi kann verða 500 krónur.

# Vágbingar sluppu ikki at seta síni fingramerki



SØLVI ANDREASEN
900 Vágur

Aftan á býráðsfundin í síðstu viku, tá Áki Bertholdsen ringdi og spurdi, hví vit valdu at stovna okkara egnu sosialu deild, metti eg ikki at nøkur blaðskriving skuldi standast av hesum. Men í Sosialinum hin 21. september kemur so ein long blaðgrein, har min vinur, samstarvsfelagi og starvsfelagi, Jens Johannesen kemur við frágreiðingum um málið. *Eg skrivi hettar og komi ikki við aftursvari.* Eg skal ikki koma við nøkrum nýggjum, men bert kommentera nakað av útsøgnum hansara. **<u>Eru teirra orð</u>** (sosialurin nr. 182 – 21 sept. 2006) Í einum samstarvshøpi eru tað partarnir sum samstarva, men í greinini vísir Jens á, at hettar er upplegg frá Tvøroyrar býráð – hvar eru hinir partarnir í uppbygginini av málinum? Víst verður í útalilsinum, at Tvøroyrar býráð hevði stovnað eina sosiala deild, og hinar komunurnar sloppu (allarnådigst) at seta síni fingramerki í hesa avtalu, sum Tv. Býráð hevði gjørt. Eitt ófrávíkiligt krav frá vágbingum var, <u>at sosiala deildin skuldi hava opið í Vági og Tvøroyri, tað kom ikki við í samstarvsavtaluna.</u> Tá vit vístu á hettar, segði Kristin Mikkelsen, at Tvøroyrar býráð hevði brúkt nógva tíð upp á sáttmálan (samstarv??) og tað blivu ikki nógvar broytingar framdar. Vágbingar fingu einki lyfti um, at tað kom at standa í sáttmálanum, at opið bleiv í Vági. Ein annar tvørámaður, býráðslimurin og bygdamaður mín Sverri Midjord segði, at nú varð nokk farið av Tvøroyri, tað skuldi einki meir úr býnum. Jens fílist á, hvussu leingi teir skuldu blíva við at samráðast. Tað var eingin samráðingarfundur hildin, men bert kunnandi fundir millum bý/bygdaráðslimir. Og teir vóru tveir í tali, aftan á at Tv. býráð hevði orðað leistin, ið teir valdu at samstarva eftir. **<u>Smidligari loysn</u>** (sosialurin nr. 182 – 21 sept. 2006) Her verður í greinini víst á, at Tv. Býráð hevði valt leist, og sosiala deild skal liggja (nær hevur verið samráðst um hettar, hvar sosiala deild skal liggja). Tað hevur verið skotið upp og sagt nógv ymiskt, men samráðingar hava ongar verið. Tað hevur verið og er ein stórur bági í samstarvi millum Tvøroyri og Vág og tað er tí, at ongar samráðingar eru. Víðari vísir Jens á, at so sum hann hevur skilt, so brúkar Vágs kommuna henda sama leistin, fyri at samráðast um eina sosiala deild í syðru hálvu. Men so er ikki Jens, tú mátti biðið, heimildamannin sum bæði tú og eg vita hvør er, um at víst tær samstarvsavtaluna. Samstarvsavtalan sum Bergur Berg gjørdi er væl úr hondum greidd, so sjálvandi brúka vit hana, tá vit nú hava hana við hondina, høvdu tit brúkt hana til fulnar og troytt møguleikarnar í samstarvinum var nógv vunnið. Í partinum um samstarvsøkið nevna vit, at samstarvað verður um tey øki, sum vit samráða okkum fram til. Og tað var tað sum glapp í samstarvinum millum Tvøroyri og Vág. Tvørámenn søgdu her skuldu ikki stórar broytingar til, og so er alt sagt um samstarv. Jens Johannesen sigur at enda, at hetta var lættasti mátin, og hann valdu vit. Vit mugu siga, at hettar var einasti mátið og hann valdu vit. Vón mín er eisini, at vit einaferð seinni finna felagsstev á hesum í mínum hugaheimi sera stóra og viðkvæma øki. Eg vil við hesum ynskja Tvørámonnum blíðan byr frammyvir.

# Harðskapur – lærið av Sønderborg



MARTIN KÚRBERG

Sat og læs um, at nú var aftur harðskapur í býnum í Havn. Hugsstoytandi kortini aftur eitt offur, aftur ein ákærdur.

Hugsi at tað kundi verið vert at hugt nærri eftir, hvat kommunan í Sønderborg roynir at gera fyri at tálma harðskapinum. Har er eitt samstarv millum kommunu, politi og náttklubbarnar komið í gongd, har fólk, sum verða dømd fyri harðskap, verða útihýst úr náttarlívinum í vikuskiftinum í tvey ár.

Verða tey sædd á náttartíð í býarlívinum, verða tey handtikin og latin leys, tá dagur er. Hettar vildi kanska fingið onkran at hugsa seg um, áðrenn viðkomandi nýtur harðskap sum fyrsta val.

# Hvar eru trupulleikarnir?



ROLF GUTTESEN

Tað er ofta hugaligt hjá summum at tosa um trupulleikar hjá grannanum.

Lat meg seta nakrar fáar spurningar, nú eitt útmerkað orðaskifti hevur tikið seg upp um sjúkhúsverk.

Hvar man tað føroyska sjúkhúsverkið liggja, um ein "pisakanning" verður gjørd av hesum.

Eru tey føroysku sjúkhúsini "akkrediteraði" (kvalitetsvurderaði) av amerikanska góðskumetingarstovninum Joint Commission International (JCI), soleiðis sum sjúkhúsini í HS (Hovedstadens Sygehusfællesskab, har Rigshospitalet er ein partur) eru blivin bæði í 2002 og 2005? Har hægstu kræv verða sett til hesi punkt, (endurgivið frá internetsíðuni:
*http://www.rigshospitalet.dk/rh.nsf/Content/8BC8035D39310224C1256F86004530C3?OpenDocument*

---

De 368 standarder dækker følgende områder:
Adgang til behandling og sammenhængende patientforløb
Patient- og pårørenderettigheder
Vurdering af patienter
Behandling af patienter
Vejledning af patient og pårørende
Kvalitetsudvikling og patientsikkerhed
Forebyggelse og kontrol af infektioner
Ledelse
Sikkerhed, infrastruktur og forsyninger
Personalets kvalifikationer og uddannelse
Data og informationsstyring

# Hans Pauli sigur ósatt



JARVIN FEILBERG HANSEN
Formaður í Føroya Pedagogfelag

Mikil orðadráttur hevur seinastu dagarnar verið millum Finn Helmsdal, løgtingsmann og Hans Paula Strøm, landstyrismann, um flytanina av 5 búfólkum frá bústovninum við Sundsvegnum og út á Eirargarð.

Eg kann sum formaður felagsins váttað, at Hans Pauli Strøm ikki hevur grein í sínum máli, tá hann sigur, at eingin viðmerking er komin til Serstovnadeildina. Tað er beinleiðis lygn!

Álitisfólki á stovninum hevur sjálvt sent sínar egnu viðmerkingar til málið – og var so mikið at sær komin at handa brævið persónliga til umsitingina á Almanna- og Heilsumálaráðnum. Undirritaði læs sjálvur viðmerkingarnar ígjøgnum áðrenn skrivið varð handað, og tískil sat eg sum kánus, tá eg í Tinginum hoyrdi landsstýrismannin siga, at ongin viðmerking var komin.

Sigast skal eisini í hesum sambandi, at avgerðin um at flyta búfólkini út á Eirargarð er tikin fyri fleiri mánaðum síðani, tí tann 31. august vóru umboð fyri serstovnadeildina greiddi starvsfólkunum frá hesum. So har varð ongin vegur uttanum. AVGERÐIN VAR TIKIN – og stóð ikki til at broytast.

Starvsfólkini vóru als ikki tikin við uppá ráð – men tað kundi man kanska heldur ikki væntað, tí hetta er enn eitt dømi um, hvussu nógvir spurningar verða avgreiddir. Hví ikki hava serkunnleikan – starvsfólkini – við í hesari viðgerð?

Føroya Pedagogfelag hevur eisini sent Serstovnadeildini skriv um við fyrispurningi um hvørjar broytingar eru í væntu innan Serstovnaøkið. Men svarið varð í stuttum, at tað skuldu vit ikki blanda okkum uppí, tí Føroya Pedagogfelag hava ongan leiklut í teirri ráðleggingini leiðslan fyri Heimarøktini og Serforsorgini arbeiði við!!

Hetta eru tónarnir – og ikki haldi eg, at tað eru blíðir tónar, sum boða frá samstarvi.